tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakkstein, Høgni Mohr
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Caragata og fullveldi

Oddagrein

Nú hava menn ofta skjótt við rættiliga ósmæðið at samanbera fullveldisskeptikarar við slíkar, ið bardust ímóti føroyskum máli í skúlunum o.s.fr. Fyri at brúka orðavalið hjá landstýrismanninum í sjálvstýrismálum, so tykist hettar at vera ósakligt og óseriøst. Um nakar søguligur paralellur skal dragast, so kunnu vit hyggja at, hvat Tjóðveldisflokkurin segði í sjeytiárunum, tá tveyhundrað fjórðinga sjómarkið kom. Tá søgdu tjóðveldismenn, at føroyski landgrunnurin var meira enn nokk til at breyðføða einum føroyskum tjóðveldi. Serfrøðin talaði ímóti, og hvør fekk rætt? Hvussu hevði sæð út í dag, um vit bert dúvaðu uppá landgrunnin? Nú síggja vit, at serfrøðin sigur fall í livistøði, um fullveldisætlanin gerst veruleiki, meðan Tjóðveldisflokkurin sigur nakað annað. Søgan tykist at endurtaka seg. Spurningurin er bert hvørjum borgarin skal trúgva.

Landstýrismaðurin í sjálvstýrismálum Høgni Hoydal hevði í bløðunum eina grein, har hann segði, at leið hansara kann gjøgnumførast "uttan nakran skelk í búskapinum." Hettar tykist løgið eftir at serfrøðingar og sjálvt búskaparparturin í Hvítubók — og tað sigur ikki so lítið — siga, at lønarfall og kreppa kann vera eitt stutttíðarárin av at blokkurin verður minkaður yvir eitt áramál. Betur stendur Høgni Hoydal neyvan eftir, at íslendsku útrokningarnar, ið komu aftaná Hvítabók var útkomin, málaðu myndina enn daprari eisini uppá longri sikt.

Tá Tjóðveldisflokkurin nú hevur hildið uppá, at vit ikki fara at fáa fall í lønum og økt arbeiðsloysi um fullveldisætlanin gerst veruleiki, so var tað ikki við sørt av spenningi, at vit fylgdu framløguni av Caragata og vinnupolitikki fyrr í vikuni. Spennandi var at vita, hvussu Tjóðveldisflokkurin ætlaði at fíggja loysingina. Fólkaflokkurin vil fíggja loysingina við privatiseringum og einum skerdum almennum sektori við skerdari vælferð sum úrsliti. Fyrr í vikuni kom so rættiliga skelkandi fram, at Tjóðveldisflokkurin hevur einki boð, hóast teir hava forkláringstrupulleikan yvirfyri Føroya fólki og andstøðuni.

Andstøðan fær illa gjørt annað enn at geva Tjóðveldismonnum eitt sindur av tíð at prógva, at serfrøðin og ein meiriluti av Føroya fólki fara skeivt. Fullveldisfyrimyndin liggur svart uppá hvítt á løgtingsborði í skapi av Caragata álitinum, og einki kom frá Tjóðveldisflokkinum sum gevur nakra ábending um, at talan bert er um ræðumyndir, tá andstøðan vísir á vandar fyri framman.

Loysa kunnu føroyingar altíð, um teir hava hug til tess og vilja betala prísin. Søguligi møguleikin hevur einki við fullveldi at gera. Søguligi møguleikin er, at tryggja og menna føroyska vælferðarsamfelagið í einari tíð, har høgrarákið við sjálvsøknishugburði og ósmædni ger seg galdandi. Tað er at harmast um, at Tjóðveldismenn sótu passivir í tingsalinum og lurtaðu eftir samgongutingmanninum og fólkatingsmanninum Óla Breckmann, meðan hann bar í bøtuflaka fyri Haider í Eysturríki. Hvussu nógv afturat skal seljast fyri fullveldisætlanina? Er tað vist, at tað samfelagið, ið vit sita eftir við, skorið eftir Fólkafloksleisti og Caragata, er ynskiligt? Tað einasta, ið tykist vera vist í hesum máli er, at tað ber illa til at taka fullveldi og síðani vænta, at alt annað fer at loysa seg sjálvt. Tað er ikki nóg mikið, at Tjóðveldisflokkurin sigur, at Caragata samfelagið ikki gerst veruleiki, tí teir søgdu tað sama um P/F Vágatunnilin, og pensiónshandfaringina hjá landsstýrinum.

Sosialurin

Viðmerking:

Løgtingsins umboð ella umboðsfólk — Ja, hvussu skal barnið nú eita?

Nú málið um at seta á stovn eitt løgtingsins umboðsfólk fyri Føroyar, hevur spurningurin reist seg, hvat navnorðið fyri hetta starv skal verða,- skal tað verða løgtingsins umboðsfólk -umboðskvinna --maður ella bara løgtingsins umboð

Jamen, tað eitur jú umboðsmaður í øllum grannalondum, so hví ikki hjá okkum við? Men til tað er at siga, at tá ið parlamentariskir umboðsmenn í okkara grannalondum eru settir á stovn, hevur hetta verið í eini tíð, tá ið tað var óhugsandi, at nøkur kvinna kom upp á tal til starvið, og tá er tað ikki so løgið, at navnorðið hevur verið lagað til kallmenn.

Herheima gera vit okkum hinvegin tankar um hetta starv í ár 2000, tá tað eins væl kann verða talan um eina kvinnu, sum verður sett í hetta starv, og tí er spurningurin um heitið á hesum starvi ikki heldur átti at verið løgtingsins umboðsfólk ella bara løgtingsins umboð.

Málið, vit tala, er eitt úrslit av tí tíð, vit liva í: ? Man tað ikki eita sjúkrasystir, vaskikona, seymikona, ljósmóðir ella jarðamóðir júst tí, at tá ið hesi navnorðini eru vorðin til, tá var tað so sjálvsagt, at hesi størv vórðu mannað við kvinnum, og tí var onki galið í at enda orðini við systir, kona ella móðir.

– Eins sjálvsagt var tað, at størv sum løgmenn, løgtingsmenn, formenn, grindamenn, sjómenn ella timburmenn vórðu mannað við monnum, og tí varð endin á hesum størvum maður

Arbeiðsbýtið millum kvinnur og menn, sum eyðkendi tíðina, sum farin er (og sum fyri ein stóran part framvegis ger tað), var góð orsøk til at navngeva, sum gjørt var. Málið, vit tala, er jú eitt úrslit av tí tíð, vit liva í.

Arbeiðsbýtið millum kvinnur og menn er hinvegin ikki so uppbýtt ár 2000, sum tað t.d. var ár 1900, og tí setir tað eisini øðrvísi krøv til navngeving nú á døgum, - serliga tá ið talan er um nýggj størv sum í hesum føri: løgtingsins umboð.

Maður merkir fólk

Hetta, at maður upprunaliga merkir fólk, verður vanliga nýtt sum grundgeving fyri at enda heitið á størvum við -maður, tí so verða kynini bæði vard. Tað er rætt at maður upprunaliga merkir fólk; og í talaða málinum - enn tann dag í dag - verður maður eisini uppfatað sum verja fyri bæði kynini t.d. tá ið vit nýta maður í hvørsfalli til dømis: Millum manna /Manna millum / Hoyri ikki manna mál / Báturin varð mannaður við kvinnum osfr.

Men í flestu førum verður orðið maður, bundið við kallmenn, sjálvt um orðið upprunaliga eisini umfatar kvinnuna. T.d.ivast ongin í hvat kyn talan er um, tá ið vit tosa um mannfólk ella um menn.

Um vit tvíhalda um, at maður framhaldandi merkir fólk, tvs at at teir bæði kunnu verða maður og kona er tá ikki vandi fyri, at maðurin gert kynsleysar?!

Spillir navnið ongan?

Venda vit viðgerðina á høvdið og koyra menn aftur kvinnuheitið, so kundi ein setningur so hóskandi itið:

- løgtingskvinnurnar Edmund Joensen, Torbjørn Jacobsen og Hendrik Old atkvøddu ímóti ella
- landsstýriskvinnan Finnbogi Arge umsitur samferðslu

Tá hugsi eg, at ikki bara mállæran, men eisini samleikin hevði gjørt ein vørr.

Tað verður ofta hildið av teimum, sum hava tað øvugta sjónarmiðið, at hetta sum borðreitt verður við her er undirlutakent, hysteriskt, (sum onkur kallaði tað í bløðunum herfyri), men hví ikki verða so mikið at sær komin, at bera góðar grundgevingar fram, sum siga, hví tað ikki kann eita løgtingsins umboð ella løgtingsins umboðsfólk heldur enn -maður. Hevði tað ikki verið meiri fólkaligt ella mansligt?!

Annita á Fríðriksmørk

Hvussu tryggja vit okkum ein landbúnað í framtíðini

Bóndafelag Føroya og Meginfelag Búnaðarmanna bjóða til fyrilestur á Búnaðardeplinum fríggjadagin 25. februar 2000 kl. 13-16

Fyrilestrarhaldari er Ole Christian Hallesby landbúnaðarráðgevi í fíggjarspurningum. Serliga arbeiðir hann við at hjálpa bóndum við avgerðum sum hava ávirkan á liviumstøðurnar í framtíðini. Millum annað skipar hann fyri framtíðarsmiðjum fyri Norsk Bondelag. Hann hevur orð á sær, at leggja dent á tey mennniskjaligu virðini. Meir fæst at vita við at lesa blaðgreininia, ið er hjáløgd.

Spurningarnir hann millum annað fer at viðgera:

- Samanberingar millum Noreg og Føroyar
- Landbúnaður sum politisk økismenning
- Eingin bóndi, eingin landbúnaður, eingin búseting
- Hvussu yvirlivir bóndin í framtíðini
- Viðurskiftir bóndin sjálvur hevur ávirkan á
- Áskoðan á at reka landbúnaðarvinnu
- Støðan til ótryggleika
- Hvat er ein dugnaligur bóndi
- Framløga av skipaðari virkisætlan.

Hesin fyrilestur er ætlaður tykkum, ið arbeiða fyri ella hava politiska ella umsitingarliga ábyrgd fyri landbúnaðinum í Føroyum. Vónandi fæst eitt tjak í lag nú boðaða er frá aðalorðaskifti um landbúnaða á tingi.

Tilmelding fer fram á Búnaðardeplinum telefon 421300. Kostnaður fyri hvønn er 150 kr. og skal flytast á konto í Føroya Banka nummar 428 155 3 ella postgiro nummar 61042.

Sorg - missur - meining

Fyrilestur við Bent Falk

Í juni mánaða í fjør høvdu føroysku prestarnir skeið í sálarrøkt, har annar fyrilestrahaldarin var Bent Falk, prestur og psykoterapeutur. Longu tá varð avrátt, at Bent Falk skuldi koma aftur, og í hesum døgum eru prestarnir á framhaldandi skeiði í Norðurlandahúsinum.

Bent Falk er kendur fyrilestrahaldari og skeiðsleiðari í Norðurlondum og í Týskland. Umframt at undirvísa á hægri lærustovnum eru tað serliga prestar, psykoterapeutar og starvsfólk á sjúkrahúsum, sum hava boð eftir honum. Bent Falk hevur skrivað tvær bøkur: "At være dér hvor du er" er um at samrøða, og er serliga ætlað fólki, sum í teirra arbeiði eru um fólk, sum stríðast við tungar spurningar. "Kærlighedens pris" er guðfrøðiligar og sálarfrøðiligar greinir um lív og trúgv. Við á ferðini hesaferð er Inger Bollerup, sjúkrasystir og psykoterapeutur.

Í fjør helt Bent Falk fyrilestur fyri stúgvandi fullari útvarpshøll, og nú hóskvøldið 24. februar kl. 19.00 skipa Prestafelagið og Føroya Læraraskúli fyri almennum fyrilestri í læraraskúlahøllini við evninum "Sorg - missur - meining" við Bent Falk.

Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu okkum stóra samkenslu, tá elskaði maður mín, pápi, varpápi og abbi okkara

KJARTAN JOHANSEN

so brádliga doyði frá okkum.

Hjartans takk øll tit, sum komu inn á gólvið við troyst og hjálpsemi. Takk fyri heilsanir og fjarrit.

Takk til Bjarna Bæk fyri troystarrík orð. Hjartaliga takk fyri sangin í Dómkirkjuni og úti á grøvini. Takk fyri blómur og kransar og takk til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

Erla, Majken, Bjarni og abbabørnini

Allir møguleikar eru enn opnir

Á býráðsfundi mikukvøldið var semja um, at Klaksvíkar Kommuna ikki verður við í einum kommunalum samtaki, tá kommunuskuldin skal endurfíggjast. Eisini var samtykt, at kommunan nú skal seta eitt fólk í sambandi við yvirtøku av barnaansingarøkinum

JÁKUP MØRK

Á býráðsfundi í Klaksvík, sum varð hildin mikukvøldið, málið um endurfíggjanina av kommunuskuldini á skránni.

Í farnu viku stóðst stórur orðadráttur av hesum máli, tí borgarstjórin, Jógvan við Keldu, í samrøðu við Sosialin hevði sagt frá, at eitt samt býráð ikki tók undir við loysnini, um Landsbankin, saman við Unibank, arbeiddi við.

Varð staðfest

Á fundinum mikukvøldið var tó staðfest, at semja er um, at Klaksvíkar Kommuna skuldi arbeiða fyri, at innistandandi í kommunala kreppulánsgrunninum verð frígivið skjótast gjørligt.

Áður hevur tað verið ført fram, at kommunan skal fáa helmingin av peninginum útgoldið í einum, meðan seinni helmingurin verður útgoldin yvir ávíst áramál.

Breið semja var um, at Klaksvíkar Kommuna ikki skuldi fara inn í eitt kommunalt samtak, har ein nýggjur peningastovnur var við í endurfíggjanini, men at hetta ístaðin skuldi gerast á tann hátt, at kommunan í beinleiðis samskifti við lánveitararnar gjørdi avtalur fyri, hvussu skuldin skal endurindast.

Framman undan hevur kommunan havt samband við lánveitarar sínar, og hava hesir sýnt vælvild viðvíkjandi endurfígging av kommunalu skuldini, nú samhaldsfasta avtalan frá 1995 er um at renna út.

Jógvan við Keldur, býráðsformaður, sigur við Sosialin, at enn er tó einki avgjørt um, hvussu kommunala skuldin skal fíggjast í framtíðini. - Semja var um, at kanna allar møguleikar, og verður hetta nú gjørt, sigur býráðsformaðurin, sum harumframt metir, at um trupulleikar koma í framtíðini, er tað lættari at loysa hesar, um kommunan hevur beinleiðis samband við lánveitararnar, ístaðin fyri at vera partur í einum samtaki.

Alt er enn opið

Karl Heri Joensen, sum farnu viku fanst hvassliga at býráðsformanninum, Jógvan við Keldu, sigur við Sosialin, at eftir hansara fatan er loysnin hjá Landsbankanum als ikki útilokað.

Sjálvur sigur hann, at fremsta orsøkin til, at hann í løtuni ikki kundi taka undir við uppskotinum frá Landsbankanum var, at hann so at siga ongar upplýsingar hevði fingið hesum viðvíkjandi.

Hann vísti á, at einki umboð fyri býráðið hevði verið á kunnandi fundi við Landsbankan, og tá skrivliga tilfarið heldur ikki sýndi nakað nágreinuligt um málið, kundi hann ikki uttan víðari taka undir við hesum.

Hann vísti í hesum sambandi á, hvussu leikur fór, tá kommunuloysnin á sinni varð samtykt. -Tá var tað við ringum tannabiti, at eg atkvøddi fyri avtaluni, tí úrslitið gjørdist ikki tað, sum vit høvdu væntað, sigur Karl Heri Joensen.

Tað hann í hesum sambandi sipar til, er at nakrir av lánveitarunum noyddu kommununa at rinda 9% í rentu, við tað at tað vóru lánveitararnir og ikki kommunurnar, sum gjørdu av, um lánsgjaldið skuldi verða 10% av skuldini, har rentan var ásett eftir marknaðarrentuni, ella um talan bert skuldi verða um gjald fyri rentur, sum framman undan varð ásett at vera 9%. Tá marknaðarrentan í avtalutíðarskeiðinum var rættuliga lág, viðførdi hetta eina rentuútreiðslu, sum smb. andstøðuliminum var fleiri milliónir hægri enn neyðugt.

Tískil kundi hann ikki uttan víðari taka undir við eini solidariskari loysn, har hann als ikki kendi allar smálutirnar.

Sum nevnt omanfyri, so metir Karl Heri tó ikki, at uppskotið hjá Landsbankanum er útilokað eftir fundin mikukvøldið.

-Semja var á fundinum um, at kommunan átti at kannað allar møguleikar fyri framtíðar fígging, og hetta inniber eftir míni fatan, at um nakað meira verður at frætta um uppskot Landsbankans, eigur hetta eisini at verða kannað.

Karl Heri legði afturat, at mikudagin var skriv komið frá løgmansskrivstovuni, sum viðvíkti ætlanunum hjá Landsbankanum. Orsakað av stutta skotbráðnum varð hetta tó ikki viðgjørt á fundinum, men hann roknaði tó við, at hetta fór at verða gjørt seinni.

Barnaansingin verður nú yvirtikin

Annað mál á fundinum var, hvussu barnaansingin í Klaksvíkar Kommunu skal skipast komandi árini.

Í hesum máli tók býráðið undir við tilmæli frá sosialu neynd og fíggjarnevndini.

Í stuttum kann sigast um uppskotið, at eitt starvsfólk verður sett í samband við ætlaðu yvirtøkuna av barnaansingarøkinum.

Harumframt skal umsitingin í býráðnum arbeiða viðari við at kannað møgulig hølisviðurskifti fyri einum barnaansingarstovni aftur at í Klaksvíkini, umframt at arbeiðast skal fram ímóti eini heildarloysn á barnaansingarøkinum.

Í løtuni eru tilsamans 288 børn í barnaansingarskipanini hjá Klaksvíkar Kommunu, sum fevnir um barnagarð, útibarnagarð og kommunalu dagrøktarskipanina.

Karl Heri Joensen, býráðslimur í Klaksvík, metir, at enn er loysnin hjá Landsbankanum ikki útilokað, hóast kommunan í fyrsta umfarið hevur sagt nei takk.

ÚTSØLA Pf. Svend

Krosstein ÚTSØLA við avsláttri heilt upp til 90%
byrjar mánadagin 28. feb. kl. 08.00 (í morgin 26. feb. er stongt)

HAFA KONTRAST BAÐIRÚMSMØBLAR

Nr. 1 HAFA KONTRAST Breidd: 90 cm. v/marmorvaski Hvítt Fyrr 5.396,75 NÚ 4.317,-
Nr. 6 HAFA KONTRAST Breidd: 120 cm. v/marmorvaski Hvítt Fyrr 7.830,75 NÚ 6.264,-
Nr. 2 HAFA KONTRAST Breidd: 90 cm. v/marmorvaski Hvítt Fyrr 5.959,50 NÚ 4.767,-
Nr. 7 HAFA CARL Yvirskáp B: 60 cm. H: 60 cm. D: 15 cm. Fyrr 1.087,50 NÚ 870,-
Nr. 3 HAFA KONTRAST Breidd: 90 cm. v/marmorvaski Hvítt Fyrr 4.162,00 NÚ 3.329,-
Nr. 8 LILLEBROR Yvirskáp, hvítt B: 55 cm. H: 67 cm. D: 29 cm. Fyrr 1.095,00 NÚ 876,-
Nr. 4 HAFA KONTRAST Breidd: 90 cm. v/marmorvaski Hvítt Fyrr 5.396,75 NÚ 4.317,-
Nr. 9 HAFA OSCAR Yvirskáp, hvítt B: 60 cm. H: 51cm. D: 120 cm. Fyrr 812,50 NÚ 650,-
Nr. 5 HAFA KONTRAST Breidd: 90 cm. v/marmorvaski Hvítt Fyrr 5.959,50 NÚ 4.767,-

Hvítt skammfílað *sanitet* við nógvum avsláttri
Avmarkað nøgd!
1 kr. marknaður
Blýantar - Blýantspiskarar - Skrivibokur - Roknihefti o.m.a.

GUSTAVSBERG IFÖ LITAÐ SANITET
WC, hondvask, soylur, bidé, baðikør, brúsubakkar
ALT SKAL ÚT!
Avsláttur upp til 90%

RONDO FORKROMAÐ BAÐIRÚMSSETT
Sera flottur stílur
1 pappírhaldari - 3 knagar
1 WC-bust - 1 sápuskál
1 haldari til sápuskál
Fyrr 942,50 NÚ 700,-

CONTOUR
1 pappírhaldari
1 tannglashaldari
1 WC-bust
3 krókar
Fyrr 1.038,75 NÚ 999,-

LITAÐIR KRANAR
til hondvask, køk, bidé, baðikar og brúsu.
GER KVETTIÐ ALT SKAL ÚT!
Kókskranar Dømi: Fyrr 2.100,- NÚ 150,-

BAÐIRÚMS- OG RØR VENTILATORAR
Avsláttur upp til 40%

KØKSVASK
úr stáli
Avsláttur upp til 50%

TIL BAÐIRÚMIÐ
Baðirúmsseriur í ym. litum
Forhang - Brúsistengur
Brúsusett o.a.
NÓGV NIÐURSETT!
Brúsusett Dømi: Fyrr 462,50 NÚ EINANS 50,-

BRÚSUKABINUR við nógvum avsláttri
RADIATORAR við skammfíli við nógvum avsláttri
Dup. ÚTIKRANAR - avsláttur upp til 80%
GÓLVRISTIR - avsláttur upp til 80%
SLANGA til vatnleiðing svart (40 og 63 mm.)-50%

RESÚTSØLA AV SKRIVSTOVULUTUM OG LUTUM TIL SKÚLABRÚKS
Brævordnarar - Registerpappír -Plastlummar
Bikur v/pappírsclips á 1000 stk. o.m.a.
Avsláttur upp til 40%

ANNARS NÓGV GÓÐ TILBOÐ
Umfatar allar útsoluvørur:
Einans kontant. Vørumar verður ikki avlagdar, umbýttar ella afturtiknar

Falkavegur 6 - FO 110 Tórshavn
Tel. 314600 - Fax 314601
Teldupostur: sk@post.olivant.fo

Sosialurin - 311820